# Aftur stórt tap og einki mál

**Í dag tykjast KÍ kvinnurnar hava møguleika fyri at vinna árliga sigurin í europeisku kappingini**

UEFA CUP KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Eftir at KÍ kvinnurnar, sum í hesi vikuni eru í Hollandi og luttaka í innleiðandi UEFA Cup umfari, hava spælt tvær ferðir 90 minuttir, eiga tær framvegis til góða at skjóta fyrsta málið.

Týskvøldið taptu tær 8-0 ímóti eingilska Fullham, og hóskvøldið eydnaðist tað heldur ikki at skjóta mál. Tá var mótstøðuliðið vertirnir Teer Leede. Umleið 300 áskoðarar fegnaðust um trivaliga heimasigurin upp á 5-0.

Sambært heimasíðuni hjá Norðlýsinum, sum fylgir við Europa Cup ferðini hjá KÍ kvinnunum, so hevði KÍ bóltin meiri hesa ferð, enn tær høvdu í fyrsta dystinum, tá ið eingilska liðið var sera ágangandi og ongantíð gav KÍ kvinnunum frið. KÍ hevði fleiri hornaspørk, og serliga Rannvá B. Andreasen hevði fleiri royndir ímóti málinum, men tað eydnaðist ikki at fáa bóltin inn um málverjan hjá hollendska liðnum, sum var sera stinn.

Jón Harald Poulsen, annar av KÍ venjarunum, sigur, at mótstøðuliðið beinanvegin fekk tvey mál, sum vóru rættuliga bílig. Í tí fyrra førinum – tað var í 4. minutti – kom málið eftir afturlegging. Talan var so at siga um sjálvmál, sum var púra óneyðugt. Fýra minuttir seinni var 2-0. Ein av mótstøðuspælarunum gjørdist einsamøll við KÍ málverjanum. Í 19. og 32. minutti var aftur galið. Í báðum førunum var talan um mistøk í verjuni, sum vórðu dyggiliga sektað.

Í steðginum varð roynt at rætta upp á verjuspælið, og tað gekk væl betri í 2. hálvleiki. Tá fekk hollendska liðið bara mál í síðstu løtu, tá ið tær settu fríspark beinleiðis í málið.

Úr KÍ leguni verður sagt, at tað er heilt týðuligt, at teirra lið hevur trupulleikar, tá ið verjan verður sett undir trýst. Tað er ikki so undarligt, tí í heimligu kappingini er KÍ verjan so at siga ongantíð undir trýsti. KÍ hevur higartil vunnið allar landskappingardystirnar við umleið tíggju málum og ofta við meiri enn so.

Bæði í fjør og í fyrraárið eydnaðist tað KÍ at vinna ein dyst í Europa Cup. Í dag skal KÍ spæla ímóti FC Codru úr Moldova, og møguleikar tykjast vera fyri góðum úrsliti. FC Codru tapti týsdagin 8-0 ímóti Teer Leede, og hósdagin taptu tær 9-1 ímóti Fullham. Í dag fara Fullham og Teer Leede at spæla um fyrsta plássið í bólkinum, og KÍ fer at stríðast við FC Codru fyri at sleppa undan fjórða og aftasta plássinum.



*Kvinnurnar hjá KÍ hava ikki fingið stórvegis av mótstøðu í heimligu kappigini, og tí er tað ein heldur óvand støða hjá teimum, nú tær spæla móti sterkum útlendskum liðum*

B36-Skála:

# Gongd skal á

**Hjá heimaliðnum er nú um at vera seinasta útkall fyri einum oddasessi, og hjá gestunum skulu stig til, um sleppast skal av botnsessinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað er einki at siga til, um tey bæði í B36 og Skála iðra seg eitt sindur um, hvussu gongdin hevur verið higartil hetta kappingarárið.

Hjá árstalsfelagnum vórðu øll segl sett til undan árinum, soleiðis at styrkin á besta mansliðnum skuldi vera størri enn hjá nøkrum av mótstøðuliðunum. Á pappírinum hevur fólkið eisini verið framúr, men á stigatalvuni, har úrtøkan verður uppgjørd, hevur ikki vignast eins væl. Serliga byrjanin var ring, men eftir útisigur á júst Skála gekk tó slag í slag, og undan steðginum hevði liðið vunnið seg á toppin.

Síðani er tó aftur gingið skeiva vegin. Tvey tap á rað hava viðført, at fjarstøðan upp til HB nú er fimm stig, og tí eru ikki ráð til tey allar minstu mistøkini, um bara vónin um oddasessin skal liva.

Og hjá havnarliðnum tykist tað vera so, at allir mans eru tøkir til dystin sunnudagin. Jákup á Borg hevur verið burturstaddur í vikuni, men hann skuldi koma heim leygardagin. John Petersen og Pól Thorsteinsson fullførdu ikki landsdystin móti Íslandi, men teir eru ivaleyst tøkir, og tað sama tykist Heini í Skorini vera, eftir at hann hevur sitið uttanfyri við skaða størsta partin av árinum.

Hjá Skála nyttar tó lítið at hugsa um, hvussu mótstøðuliðið hevur tað, tí her eru stig vorðin lívsneyðug. Bert ein sigur í tólv dystum er langt ífrá nóg mikið til at tryggja sessin í deildini, og tí má í minsta lagi ein eins góður endaspurtur sum í fjør til, um liðið eisini skal vera í ovasta loftalagnum komandi kappingarár.

Til dystin hesaferð hevur Skála fingið Alexander Juevic og Julian Florescu við aftur, eftir at teir vóru leikbannaðir seinast, men hinvegin er Bogi Gregersen hesa ferð uttanfyri, tí hann hevur fingið ov nógv gul kort á kontina. Yvirhøvur hava leikbann verið ein stórur trupulleiki hjá Skála hetta árið, tá týðandi leikarar mest sum hvørja ferð hava sitið uttanfyri.

Alt tað eru tó ikki ráð at hugsa um sunnudagin. Stig skulu á kontina, og fyrsta kravið fyri hesum er, at álopsspælið nú gerst mundandi meira effektivt, enn tað hevur verið størsta partin av árinum.



*Tað var júst á Skála, at B36 vendi gongdini í fyrru kappingarhálvu, og nú er um at vera seinasta útkall hjá árstalsfelagnum. Tað er hinvegin eisini støðan hjá Skála, so uttan iva fara báðir partar at leggja nógv fyri*

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 12 | 8 - 3 - 1 | 29 | 14 | 15 | 27 |
| 2 | B68 | 12 | 6 - 5 - 1 | 15 | 7 | 8 | 23 |
| 3 | B36 | 12 | 7 - 1 - 4 | 24 | 13 | 11 | 22 |
| 4 | NSÍ | 12 | 6 - 4 - 2 | 21 | 10 | 11 | 22 |
| 5 | KÍ | 12 | 6 - 2 - 4 | 15 | 17 | -2 | 20 |
| 6 | EB/Streymur | 12 | 4 - 4 - 4 | 20 | 23 | -3 | 16 |
| 7 | GÍ | 12 | 3 - 4 - 5 | 14 | 18 | -4 | 13 |
| 8 | VB | 12 | 3 - 3 - 6 | 14 | 22 | -8 | 12 |
| 9 | FS V | 12 | 2 - 2 - 8 | 16 | 28 | -12 | 8 |
| 10 | Skála | 12 | 1 - 0 - 11 | 7 | 23 | -16 | 3 |

## Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 11 | 8 - 2 - 1 | 20 | 7 | 13 | 26 |
| 2 | TB | 11 | 7 - 1 - 3 | 31 | 16 | 15 | 22 |
| 3 | Sumba | 11 | 6 - 3 - 2 | 23 | 9 | 14 | 21 |
| 4 | VB | 11 | 6 - 1 - 4 | 25 | 13 | 12 | 19 |
| 5 | KÍ | 11 | 6 - 1 - 4 | 25 | 31 | -6 | 19 |
| 6 | AB | 11 | 3 - 5 - 3 | 20 | 17 | 3 | 14 |
| 7 | B36 | 11 | 3 - 3 - 5 | 17 | 15 | 2 | 12 |
| 8 | LÍF | 11 | 3 - 1 - 7 | 14 | 32 | -18 | 10 |
| 9 | B71 | 11 | 2 - 2 - 7 | 15 | 17 | -2 | 8 |
| 10 | B68 | 11 | 1 - 1 - 9 | 5 | 38 | -33 | 4 |



# FM í 100 km súkkling

**Leygardagin verður kappast um FM í 100 km súkkling**

SÚKKLING
*tíðindaskriv*

Talan verður um eina harða og drúgva kapping. Teinurin verður frá keiini á Toftum, uppum Eiðisskarð, suður gjøgnum Sundalagið, eftir Oyggjarvegnum til Havnar.

Komnir til Havnar verður koyrt oman eftir Oyggjarvegnum, eftir Ringvegnum, niðan eftir Sundsvegnum, eftir Vegnum Langa, eftir Hvítanesvegnum har málið er.

Seinasta strekkið í Havnini skal koyrast tvær ferðir.

Unglingar koyra tó ein tein, ið er eitt sindur styttri. Munurin er, at hesir ikki koyra eftir Oyggjarvegnum, men koyra gjøgnum Kaldbakstunnilin til Havnar. Eisini hjá teimum er málið við Plantusøluna við Hvítanesvegin, og eisini teir koyra teinin Ringvegur, Sundsvegur, Vegurin Langi og Hvítanesvegur tvær ferðir. Teinurin er umleið 80 km.

Eins og til FM kappingina í einkultstarti síðsta leygardag, er undirtøkan rættiliga góð, og enn ber til at tekna seg á heimasíðni hjá Tórshavnar Súkklufelag.

Kappingin byrjar kl. 12.00 og farið verður úr Havnini kl. 10.00.

Hevur ein brúk fyri flutningi inn á Toftir, verður møtt uttan fyri bygningin hjá Føroya Tele á Hálsi.

Aftur í ár verður kappast um trý FM heiti, og leygardagin 30. august verður so kappast um hvør gerst føroyameistari í Býarsúkkling, ella tað sum í oyggjaleikahøpi eitur, Criterium.

Statoil Føroyar letur steyp og heiðursmerki til vinnararnar.



*Leygardagin verður kappast um FM-heitið á 100 kilometra teininum*

# Hoyvíksbáturi vann kappsiglingina

**Samanlagt vóru Egil og Jóhan Simonsen stinnastir at sigla kapp hetta árið**

KAPPSIGLING
*Tíðindaskriv Seglið*



Eins og Lions Club Eysturoy hevur greitt frá í bløðunum fyrr í vikuni var skipa fyri árligu Lions kappsiglingini á Skálafjørðinum, sunnudagin 17 august. Hetta var samstundis seinasta kappingin av 4 hjá felagnum Seglinum í ár

Umframt at bátarnir hava kappast samlað, hevur Seglið í 2003 haraftrat skipa kappingina í 2 bólkar, ávikavist smærri – og størri bátar. Sostatt skuldi sunnudagin finnast ein samlaður vinnari fyri 2003 + føroyameistararnir fyri smærri - og størri bátar.

Hjá smærru bátunum hava tað serliga verið Hoyvíksbáturin og Leivur, sum hava kappast, og var støðan undan seinasta umfarið at Hoyvíksbáturin var 2 stig frammanfyri. Við enn einum sigri, og harvið 3 sigrum út av 4 møguligum, staðfesti Hoyvíksbáturin føroyameistaraheitið.

Hjá størru bátunum var støðan undan seinasta umfarinum, at Malle og Niels í Nesinum lógu ájavnir við 12 stigum. Vinnarin av seinastu kapping Niels í Nesinum hevði ikki ein av sínum bestu døgum og kom ikki á stigatalvuna og sama var galdandi fyri Svan av Skála. Sostatt var 3 plássi hjá Malla nóg mikið til at tryggja føroyameistaraheitið.

### Sjógangarin

Í samlaðu kappingini um at vinna "ársins sjógangara" steypið hava sjálvsagt somu bátar gjørt seg galdandi og í bólkunum. Undan Lions lá Hoyvíksbáturin 4 stig framman fyri Leiv, so her var heldur onki avgjørt. Við enn einum topp 3 úrslitið staðfesti Hoyvíksbáturin tó støðuna sum samanlagt fremsti og støðugasti báturin 2003 framman fyri 2 kollfjaðrabátum, nr 2 Leivi og nr 3 Malla.

At enda fegnast felagið um at bátatalið øktist mundandi í ár eftir at verða falli seinastu árini. Vónandi síggja vit enn fleiri bátar til kappsiglingarnar næsta ár, eldri sum yngri. Innan alt ov leingji fer felagið og limir tess at endurskoða tær broytingar í gjørdar vóru til árið í ár, til tess at gera árið 2004 enn meira áhugavert hjá siglarum.

### ÚRSLIT OG ENDALIGAR STØÐUR

**ÚRSLIT — SMÆRRI BÁTAR**

| | Navn | Heimst. | Manning | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Hoyvíksbáturin | Hoyvík | Egil Simonsen, Jóhan Simonsen | 5 |
| 2 | Leivur | Kollafjørður | Jón Nolsøe Olsen, Bjarni Petersen | 4 |
| 3 | Miðgerð | Kollafjørður | Arngrím Petersen, Magnus Joensen | 3 |
| 4 | Vinur | Tórshavn | | 2 |
| 5 | Eyð | Runavík | | 1 |

**ENDALIGA STØÐAN- SMÆRRI BÁTAR**

| | Navn | Heimst. | Stig | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Hoyvíksbáturin | Hoyvík | 19 | *FØROYARMEISTARI* |
| 2 | Leivur | Kollafjørður | 16 | |
| 3 | Vinur | Tórshavn | 9 | |
| 4 | Miðgerð | Kollafjørður | 6 | |
| 5 | Eyð | Runavík | 5 | |

**ÚRSLIT — STØRRI BÁTAR**

| | Navn | Heimst | Manning | stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Búgvin | Strendur | Per Mikkelsen, Sæbjørn Nielsen | 5 |
| 2 | Nón | Hósvík | Agnar Olsen | 4 |
| 3 | Malle | Kollafjørður | Oddmar Joensen, Marner Joensen | 3 |
| 4 | Guðrið | Saltangará | | 2 |
| 5 | Falkurin | Strendur | | 1 |

**ENDALIGA STØÐAN- STØRRI BÁTAR**

| | Navn | Heimst. | Stig | |
|---|---|---|---|---|
| *1* | Malle | Kollafjørður | 15 | *FØROYARMEISTARI* |
| 2 | Niels í Nesinum | Tórshavn | 12 | |
| 3 | Svanur | Skála | 8 | |
| 4 | Nón | Hósvík | 6 | |
| 5 | Búgvin | Strendur | 5 | |

**ENDALIGA STØÐAN - SAMLAÐ KAPPING "ÁRSINS SJÓGANGARI"**

| | Navn | Bólkur | Heimst. |
|---|---|---|---|
| 1 | Hoyvíksbáturin | Smærri | Hoyvík |
| 2 | Leivur | Smærri | Kollafjørður |
| 3 | Malli | Størri | Kollafjørður |
| 4 | Vinur | Smærri | Tórshavn |
| 4 | Niels í Nesinum | Størri | Tórshavn |
| 6 | Svanur | Størri | Skála |
| 7 | Miðgerð | Smærri | Kollafjørður |
| 8 | Nón | Størri | Hósvík |
| 9 | Guðrið | Størri | Saltangará |
| 10 | Eyð | Smærri | Runavík |
| 11 | Falkurin | Størri | Strendur |
| 12 | Helga | Størri | Kaldbak |
| 13 | Búgvin | Størri | Strendur |
| 14 | Gjáarbáturin | Størri | Kollafjørður |
| 15 | Kollsteinur | Størri | Hósvík |